## Sjúkur laksur

Í Noregi hava myndugleikarnir staðfest sjúkuna PKN hjá laksi í einari á í Nordlandi, og nógv bendir á, at sjúkan eisini er at finna í laksi longri suðuri. Tí hava matvørueftirlitið og náttúrustýrið gjørt av at kanna laksin í tjúgu áum fyri at fáa staðfest, hvussu víða sjúkan hevur breitt seg. Í fyrstani varð hildið, at laksur doyði, tí ov lítið súrevni var í áunum, men kanningar staðfestu, at tað var PKD, ið er nýrasjúka, sum serliga rakar yngulin.



## Landa svart

Í síðstu viku ávaraði altjóða havrannsóknarstovnurin ICES um, at royndin eftir makreli á okkara leiðum er ov stór, og at veiðan er ikki burðardygg. Almennu hagtølini siga, at tað vórðu fiskað 458.000 tons av makreli í fjør, men ICES hevur varhugan av, at tann veruliga veiðan var tvær ferðir so stór. Á norska havrannsóknarstovninum verður sagt, at írar og skotar landaðu nógv meiri, enn teir góvu upp. Einki verður sagt um Noreg og Føroyar.

# Vænta 70.000 fólk í SMS um

**- Tá ið Niels Mortensen letur dyrnar upp í morginárini, verður tað til eitt SMS, sum er nógv meiri fullfíggjað enn tað gamla og har professionellir handlar og mentan á høgum støði skulu ganga hond í hond og lokka nógv fleiri fólk niðan í Sølumiðstøðina**

SMS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ongin ivi um, at vit lata upp aftur, er tað eitt meiri spennandi SMS, enn tað nakrantíð hevur verið.

Tá ið stjórin í SMS, Niels Mortensen, læsir dyrnar upp í morgin árini, verður tað við eini rættiliga góðari kenslsu, at hann býður fólkið inn um.

SMS hevur fingið eina umfatandi um- og útbygging og í dag verða dyrnar lætnar upp til eitt nýggja sølumiðstøð, sum er meiri professionell, meiri spennandi og meiri fullfíggjað enn nakrantíð.

Ein týðandi partur av sølumiðstøðini hevur verið at fáa nógv størri nyttu burturúr ovastu hæddini og tað hevur gjørt sítt til at geva rúmd fyri nýggjum handlum.

- Vit hava fingið handlar í SMS nú, sum vit ikki hava havt fyrr og sum vit hava manglað. Sostatt hava vit í dag eitt tilboð til okkara viðskiftafólk, sum er nógv meiri fullfíggjað, enn nakrantíð fyrr.

Tilsamans verða 30 handlar í SMS, nú tað letur uppaftur.

- Tað, sum er mest spennandi í tí nýggja SMS, eru handlarnir og serliga teir nýggju handlarnir, sum koma afturat.

Niels Mortensen sigur, at hann plagar at vera rættiliga krittiskur, men her má hann geva seg yvir.

- Eg eri stórliga bilsin av, hvussu høgt støðið verður í handlunum í Sølumiðstøðin og í nógvum førum er talan um handlar og merki, sum standa seg sera væl allastaðni í verðini, har teir eru.

Og tað koma fleiri nýggir handlar í SMS.

Trýarin fær ein stóran Expert handil, sum selir sjónvørp og alt, sum har til hoyrir og stjórin í SMS himprast ikki við at siga, at hetta er flottasti Experthandil, hann nakrantíð hevur sæð.

Samstundis koma fleiri handlar við klæðum, bæði til tey yngru og til tey meiri tilkomnu.

Vit fáa eisini ein IMERCO gávuhandil í SMS og tað hava vit altíð manglað. Vit fáa somuleiðis eisini ein Cosméto og har fæst bæði massasju og øll møgulig onnur húðrøkt o.s.fr.

Og tann, sum fær hug at hvíla beinini, fær eisini ein nýggjan møguleika tí nú letur eisini ein nýggj kafé upp í SMS, sum nevnist Baresso og har ber til at fáa ein kaffimunn, sum er kókaður upp á tann góða gamla mátan og har handverkið er sett í hásæti.

### Handil og mentan

Men SMS er ikki bara handil, tí sølumiðstøðin skal eisini verða ein mentanarpallur hjá føroyingum. Ì sølumiðstøðini hevur altíð verið eitt torg, sum hevur verið nógv brúkt til tíðir og tað er ætlanin, at tað skal ikki brúkast minni hereftir,

Í hesum sambandi eru nýggj ljós og onnur útgerð fingin til vega.

Kitty May Ellefsen er sett sum býlingsstjóri og ein av hennara fremstu uppgávum verður at styrkja mentanarliga partin í SMS við ymsum tiltøkum við dygdarmentan á ymsum økjum, tað verið seg framsýningar og framførslur av ymsum slagi.



Stjórin í SMS sigur, at vónin er hendan heildarloysnin, sum Sølumiðstøðin nú er vorðin, fer lokka fleiri viðskiftafólk niðan í SMS.

- Vit hava ikki sum so sett okkum nakað mál fyri, hvussu nógv fólk, vit vilja hava í SMS. Men vit vænta avgjørt at fáa fleiri fólk.

- Sum er, hava vit eini 50.000 fólk í SMS um vikuna. Vit hava nevnt, at vit miða eftir at fáa eini 70.000 at vitja okkum hvørja viku. Men tað er ikki hetta talið, sum er so avgerðandi, tí tað eru ikki øll tey vitjandi, sum koma niðan at keypa. Men vit vænta avgjørt, at talið á teimum, sum koma í SMS at keypa, fer at økjast munandi, nú útbyggingin er liðug, sigur Niels Mortensen.

Tað eru ikki bara handlarnir, sum skulu styrkja grundarlagið undir SMS.

Viðskiftafólkini skulu eisini hava umstøður at sleppa av við bilin og tann partin hava tey eisini hugsað um við tað, at tey hava fingið fleiri parkeringspláss.

Og við einum fólkagrundarlagi upp á 70.000 fólk um vikuna, ber uttan himpr til at siga, at SMS er hin allarbesti framsýningargluggi til mentanarlig tiltøk í øllum landinum

### Eru við at røkka markinum

Samstundis, sum SMS er bygt munandi um og út, er sølumiðstøðin eisini fríðkað og gjørd ljósari ov vinarligari at koma inn í.

- Tað hevur ómetaliga nógv at siga, at vit hava fingið útsjóndina við, nú vit hava bygt um og tað var eisini ein av høvuðsuppgávunum hjá arkitektinum, sigur stjórin.

Um- og útbyggingin, sum nú er framd, er endin á eini útbygging, sum byrjaði fyri fýra árum síðani.

